# Deildarleiðari til Barnadeildina B5

**Eitt starv sum deildarleiðari til Barnadeildina B5 er leyst at søkja til setan 1. oktober 2010 ella eftir avtalu.**

Barnadeildin hevur seingjarpláss til 7 børn í aldrinum 0 – 14 ár. Harumframt fer nógv ambulant virksemi fram í dagtímunum. Deildin hevur tætt amstarv við onnur sjúkrahús og stovnar, heima og uttanlanda. Deildin hevur regluliga vitjan av konsulentum innan barnaneurologi, barnaortopedi, barnakardiologi og í framtíðini væntandi eisini klinisk genetik. Arbeitt verður fram ímóti, at Barnadeildin eisini umfatar neonatala fakøkið, sum í løtuni hoyrir undir Skurðdeildina.

Í løtuni eru 3 barnalæknar, ein introlækni og ein lækni undir útbúgving til kommunulækna knýttir til deildina. Á deildini eru eisini sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar, námsfrøðingur, skrivarar og reingerðarfólk.

**Deildarleiðarin hevur m.a. ábyrgd av:**

- sjúkrarøktini
- dagligu leiðsluni
- fakligari menning
- fíggjarstøðuni

**Vit kunnu bjóða:**

- innleiðslu
- starvsfelagar, ið hava drúgvar royndir innan pædiatriska økið
- regluliga frálæru av barnalæknum og fakligar ráðleggingarfundir millum sjúkrarøktarfrøðingarnar
- eitt áhugvert og sera fjølbroytt øki við breiðum tvørfakligum samstarvi
- tvørfakligt samstarv
- talgild heilsuskipan

Vit ynskja ein leiðara, sum kann taka avgerðir, tolir mótstøðu, megnar at varðveita yvirlitið og at raðfesta. Tað er umráðandi, at tú hevur evni til at samstarva í eini toymisleiðslu, har loyalitetur og opinleiki stuðla undir avgerðir, ið verða tiknar í samstarvsanda.

**Krøv til umsøkjaran**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan førleika í røkt og viðgerð innan pædiatri
- góð samstarvsevni og evni til opið og erligt samskifti
- áhuga í fakligari menning av starvsfólkum sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visiónir
- teldufórleiki á brúkarastøði
- ynskiligt er, at umsøkjarin hevur ella er sinnaður at fara undir leiðsluútbúgving

Nærri fæst at vita frá Rúnu Wardum, varaleiðara, tlf. 304500, lokal 6055, lsrunwa@ls.fo ella frá Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 6102, lsingga@ls.fo

**Umsóknarfreistin er**
16. august 2010 kl. 12.00

Samrøður væntast
at verða í viku 33

Sjúklingurin í miðdeplinum

Sosialurin 341800



Gransking & menning

Trivnaður



Størv á Landssjúkrahúsinum

www.ls.fo

## Onnur leys størv:

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G1**
Umsóknarfreistin: 16. august kl. 12.00

**Kliniskur sjúkrarøktarfrøðingur til G1**
Umsóknarfreistin: 16. august kl. 12.00

**Varadeildarleiðari til G1**
Umsóknarfreistin er 16. august kl. 12.00

**Læknaskrivari til Med. Depilin**
Umsóknarfreistin er 16. august kl. 12.00

***sí meira á www.ls.fo***

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo

# Sjúkrarøktarfrøðingur til B6

**Eitt avloysarastarv sum sjúkrarøktarfrøðingur til B6 á starvsbrøki 0,5 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan 1. september 2010 ella eftir avtalu til og við 31. august 2011**.

B6 er ein nýumvæld medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum sjúklingum. Deildin hevur vanliga pláss fyri 15 sjúklingum.

**Sjúkrarøkt og viðgerð á deildini er innan hesar sergreinar:**

- gastroenterologi
- neurologi
- endokrinologi
- onkologi
- palliatión

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum:**

- sjúkrarøkt og viðgerð til sjúklingar innan tær sergreinar, ið hoyra til B6
- aktivt luttaka í menningini av sjúkrarøktini á deildini

**Krøv til umsøkjaran:**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan sergreinirnar á deildini
- góð tvørfaklig samstarvsevni teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða:**

- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Fyrimunur er um umsøkjarar hava kliniskar royndir innan sergreinirnar

Starvslýsing fæst við at ringja 304500 til Sonju Nielsen, deildarleiðara á B6, lokal 6036, lssonni@ls.fo ella til Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsingga@ls.fo

**Umsóknarfreistin er**
16. august 2010 kl. 12.00

Vit eru vorðin grønari

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ · J.C. SVABOS GØTA
100 TÓRSHAVN · TEL. 304500 · FAX 314253
LS@LS.FO · WWW.LS.FO